tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Annika Pearce, tiltakslimur fyri Bjarna Hammer, Pauli Einarsson, tiltakslimur fyri Boga Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum 2017 | 2 |
| 2 | Uppskot um broyting í reglugerð fyri dagstovnin viðv. bíðilista | 2 |
| 3 | Oljudálking á Krambatanga í 2013 - skriv frá advokati við status í málinum | 3 |
| 4 | Umsókn um matstovu- og skeinkiloyvi - Hotel Tvøroyri til ummælis | 4 |
| 5 | Vantandi havnagjald fyri Galaxy - fundur við stjóran á Strandferðsluni | 4 |
| 6 | Uppskot um stovnsetan av ungdómsráð | 6 |
| 7 | Tilnevnan av limum í tilbúgvingarbólk hjá Tvøroyrar kommunu | 8 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 1. Samanbering av skattatølum 2017

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri august samanborið við árið sum heild.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2016-2017.xls
- Skattatøl august

**28.09.00-A00-1-17**

## 2. Uppskot um broyting í reglugerð fyri dagstovnin viðv. bíðilista

### Málsfrágreiðing

Dagstovnaleiðari, Kari Petersen, við uppskoti til broyting í reglugerð fyri virksemi í dagstovninum viðvíkjandi bíðilistanum, har uppskoti leggur upp til, at foreldur, ið ynskja børn síni í dagstovn á Tvøroyri, kunnu skriva børnini upp á bíðilista 6. mánaðir áðrenn foreldrini og børnini flyta til kommununa, sí viðfesta skriv frá dagstovnaleiðaranum.

Til endaliga støðutakan í býráðnum.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Sosiala nevnd, 7. september 2017, pkt. 5:**
Sosiala nevnd tók undir við uppskotinum frá dagstovnaleiðaranum viðvíkjandi bíðilistanum, at foreldur kunnu seta síni børn á bíðilista 6. mánaðir áðrenn foreldrini flyta til kommununa.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd soleiðis at reglugerðin viðvíkjandi bíðilistanum verður broytt samsvarandi uppskotinum frá dagstovnaleiðaranum.

### Skjøl

- Uppskot um broyting í reglugerð viðv. bíðilista

**09.05.02-G01-1-13**

## 3. Oljudálking á Krambatanga í 2013 - skriv frá advokati við status í málinum

### Málsfrágreiðing

Jógvan Páll Lassen, advokatur, við skrivi til Tvøroyrar kommunu, dagfest 16. august 2017, har hann er av tí avgjørdu fatan, at kommuna ongan møguleika hevur, at føra eina sak ímóti Strandferðsluni við góðum úrsliti, og tí mælir advokaturin kommununi til, at sleppa málinum, sí viðfesta skjal.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt ikki at sleppa málinum enn, men fyrst at biðja um ein fund við Føroya Landfúta fyri síðani taka málið har frá.

### Skjøl

- Skriv við rokning frá Jógvan Páll Lassen, advokati



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Dagsordenspunkt Oljudálking í Landshavnini á Krambatanga behandlet på mødet 11. november 2015 k.docx
- Dagsordenspunkt Oljudálking í Landshavninum á Krambatanga 25-09-2013 behandlet på mødet 8. apríl 2015 kl. 17 00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2015)

**00.01.10-G00-4-17**

## 4. Umsókn um matstovu- og skeinkiloyvi - Hotel Tvøroyri til ummælis

### Málsfrágreiðing

Føroya Politi við umsókn frá Hotel Tvøroyri um matstovu- og skeinkiloyvi til ummælis hjá Tvøroyrar býráð, sí viðfestu skjøl í málinum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at mæla loyvisnevndini til at leingja matstovu- og skeinkiloyvi hjá Hotel Tvøroyri.

### Skjøl

- Kunning frá Loyvisnevndini um fund
- Fyribils svar til Loyvisnevndina
- Umsókn um matstovu- og skeinkiloyvi v.m.
- Umbøn frá politinum um ummæli í.s.v. umsóknina

**08.01.00-G01-1-17**

## 5. Vantandi havnagjald fyri Galaxy - fundur við stjóran á Strandferðsluni

### Málsfrágreiðing

Stjórin á Strandferðsluni er boðin á fund við fíggjarnevndina mánadagin tann 11. september 2017 kl. 13:00, at umrøða havnagjaldið fyri Galaxy, sum avloysti Smyril fyrr í ár, og sum Strandferðslan



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

enn ikki hevur goldið Tvøroyrar kommunu. Síðani verður málið lagt fyri Tvøroyrar býráð til støðutakan.

Hilmar Eliasen møtti á fundinum kl. 13:00. Hilmar greiddi frá, at hann ímeðan Galaxy sigldi fekk at vita, at faktura var komin frá Tvøroyrar kommunu viðvíkjandi havnagjaldi hjá M/S Smyril. Hilmar trúði, at rakstrarleiðarin hevði verið í dialog við Tvøroyrar kommunu í hesum sambandi. Havnarmeistarin segði seg ikki hava verið í dialog við rakstrarleiðarin um hesa rokning. Borgarstjórin segði, at Tvøroyrar kommuna í góðari tíð hevði kunnað Strandferðsluna um havnagjaldið fyri Galaxy. Anita Vibergsdóttir skoytti uppí, at tað var ein samtykt hjá vinnu- og havnanevndini tann 3. apríl í ár, sum álegði Tvøroyrar havn at senda Strandferðsluni rokning. Spurdur av Hilmar Eliasen, upplýsti Jón Bogi Guttesen, havnarmeistari, at rokning var send fyri havnagjald ikki bryggjugjald.
Hilmar Eliasen upplýsti, at Strandferðslan helt seg til dómin í Eystara Landsrætti í 2012, ið staðfesti, at Krambatangi er landshavn og Strandferðslan tí ikki skal betala havnagjald fyri Smyril. Hilmar Eliasen segði, at hann fer at samskifta við advokatin í hesari vikuni og í tí sambandi vendir Hilmar aftur til Tvøroyrar kommunu fríggjadagin í hesari vikuni.

**Fíggjarnevndin, 11. september 2017, pkt. 4:**
Fíggjarnevndin tók kunningina frá Hilmar Eliasen til eftirtektar og bíðar eftir aftursvarið frá honum.

**Avgerð**
Býráðið tók kunningina hjá borgarstjóranum til eftirtektar.

**Skjøl**

- Bræv við svarið, sent havnarmeistaranum og býarverkfrøðinginum
- Bræv við svarið til havnarmeistaran og býarverkfrøðingin
- Samskifti millum borgarstjóran og Chris Jan Michelsen
- 1073 galaxystrandferðslan - Havnagjald.pdf
- MV Galaxy.docx
- Móttøkuváttan frá Hilmar Eliasen
- Innbjóðing til Hilmar Eliasen, stjóra á SSL, um fund
- Útskrift av dómi í Eystara Landsrætti í 2012
- Samskifti við borgarstjóran um málið
- Kunning frá Hilmar Eliasen um dóm frá 2012



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.07.02-A08-1-17**

## 6. Uppskot um stovnsetan av ungdómsráð

### Málsfrágreiðing

Í sambandi við fyrireiking av ungdómsráðið á Tvøroyri hevur Trivnaðar- og umhvørvisnevndin hjá Tvøroyrar býráð saman við umsitingini leita sær íblástur frá donskum og føroyskum kommunum:

Úr Tórshavnar kommunu:
"Ungdómsráðið er umboð teirra ungu í kommununi. Endamálið er at skapa ein pall, har ung fáa eina rødd í býráðspolitisku skipanini og soleiðis styrkja fólkaræðið í kommununi.
Ítøkiliga skal ungdómsráðið takast við í viðgerð av málum, sum kommunan arbeiðir við og sum viðvíkja ungdóminum - eitt nú viðvíkjandi frítíðarvirksemi, lestrarumhvørvi og lestraríbúðum.
Eisini kann ungdómsráðið seta fram uppskot og hugskot til nevndir og býráð um viðurskifti, sum kunnu betra um korini og trivnaðin hjá teimum ungu."

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. februar 2017, pkt. 1:**
Nevndin mælir til at taka stig til at stovna ungdómsráð fyri Tvøroyrar Kommunu.
Heit verður á Bjarna Nyggard, trivnaðarfólk, at kanna møguleikarnar við íblástri úr Tórshavn.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. marts 2017, pkt. 5:**
Málið er útsett.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 3. april 2017, pkt. 1:**
Bjarni Nygaard, trivnaðarfólk, kunnaði um møguleikarnar fyri at stovna ungdómsráð.
Gongd er í málinum, og arbeitt verður við at fáa eitt ítøkiligt uppskot.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 1. maj 2017, pkt. 1:**
Nevndin mælir til at umsitingin ger uppskot til viðtøkur fyri ungdómsráð, sum nevndin kann taka støðu til.

Uppskot um eitt ungdómsráð, sum í stóran mun er avgreitt umsitingarliga, men til komandi fund í Trivnaðar- og umhvørvisnevndini, at hava fokus á uppskot til viðtøkur fyri eitt møguligt komandi ungdómsráð.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. juni 2017, pkt. 3:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til viðtøkur, men mælir til at broyta aldurin til frá 15-20 ár, og broyta tað til 3 frá Tvøroyrar Skúla, 3 frá Miðnámsskúlanum og 1 frá lokaløkinum.
Nevndin mælir til, at ráðið sjálvt tekur stig til gerð av búmerki.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 4. september 2017, pkt. 7:**
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. juni 2017, pkt. 3:**
Nevndin tekur undir við uppskotinum til viðtøkur, men mælir til at broyta aldurin til frá 15-20 ár, og broyta tað til 3 frá Tvøroyrar Skúla, 3 frá Miðnámsskúlanum og 1 frá lokaløkinum.
Nevndin mælir til, at ráðið sjálvt tekur stig til gerð av búmerki.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 4. september 2017, pkt. 7:**
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin, 11. september 2017, pkt. 6:**
Fíggjarnevndin mælti til, at trivnaðar- og umhvørvisnevndin saman við mentanarnevndin taka spurningin upp um møguliga stovnan av ungdómsráðið á fundi við næmingarráðið síðst í hesum mánaðinum.

**Avgerð**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini, at trivnaðar- og umhvørvisnevndin og mentanarnevndin viðgera málið saman við næmingaráðnum síðst í september mánaða.

## Skjøl

- Samb. avtalu
- Viðvíkjandi ungdómsráðnum
- Búmerki
- Vedtaegter_HUR
- Tvøroyrar Ungdómsráð - viðtøkur

**14.00.00-A00-4-16**



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## 7. Tilnevnan av limum í tilbúgvingarbólk hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Við støði í tilbúgvingarpolitikki og tilbúgvingarætlan er uppskot gjørt um tilnevnan av 6 persónum, herímillum eitt umboð fyri Hvalbiar kommunu, sum skulu mynda tilbúgvingarbólkin hjá Tvøroyrar kommunu, sí viðfestu skjøl í málinum. Til góðkenning í Tvøroyrar býráð.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at góðkenna tilnevningar av starvsfólkum hjá kommununi í tilbúgvingarbólkin.

### Skjøl

- Brøv til limir í tilbúgvingarbólkinum og Hvalbiar kommunu
- Kunning frá Hvalbiar kommunu um limir í tilbúgvingarnevnd
- Dagsordenspunkt: Uppskot til Tilbúgvingarpolitikk og tilbúgvingarætlan hjá Tvøroyrar kommunu behandlet på mødet 12. juli 2017 kl. 16:00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2017).docx



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 17:50**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Annika Pearce

Pauli Einarsson

Súsanna Bertholdsen

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 10/2017 |
| Fundardagur | 11. september 2017 kl. 17:00-17:50 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan